

## Kreppan elvir til tjóvarí

Fleiri og fleiri danir gerast handiklstjóvar – og fíggjarkreppan fær skuldina. Sambært Claus Bøgelund Nielsen frá Samvirkende Købmænd, kann pengamangul í summum familjum gera fólk til handilstjóvar. - Talan er um eina munandi øking í fráboðaðum handilstjóvaríum á 10% fyrsta hálvøar í ár í mun til í fjør, sigur hann. – Handlarnir brúka størri orku upp á at avdúka tjóvar í dag. Vakmyndatól er eitt amboð, og handlarnir eru meiri vanir við at melda tjóvarí nú enn fyrr. Samstundis herjar ein fíggjarkreppa, og fleiri hava vant seg við eitt forbrúk, sum tey ikki megna at varðveita í hesum kreppudøgum, sigur Claus Bøgelund Nielsen. – Eg kann ikki við vissu siga, at tað er fíggjarkreppan, sum er orsøkin til eitttúsund fleiri meldað tjóvaríir, men hon hevur heilt vist sín part av skuldini, sigur umboðsmaðurin fyri Samvirkende Købmænd sambært ekstrabladet.dk

# Ferðavinna í útnorðri bjóðar seg fram

**Ferðavinnustevnan Vestnorden Travel Mart verður í Keypmannahavn mikudagin og hósdagin í hesi vikuni. Hetta er ein stevna, sum ferðavinnan í Føroyum, Íslandi og Grønlandi standa aftanfyri**

FERÐAVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Annað hvørt ár verður Vestnorden Travel Mart, sum hevur sín uppruna í seinnu helvt av áttatiárunum, hildin í Íslandi, og annað hvørt ár eru Føroyar ella Grønland vertir.

Aftur í ár, nú Grønland er vertur, hava grønlendingar valt at brúka Danmark sum vertland. Høvuðsorsøkin er, at teinurin til Grønlands er langur, og ein onnur orsøk er, at umstøðurnar og rammurnar í Grønlandi um slíkar stevnur kanska ikki eru tær høgligastu og bestu.

Hetta er soleiðis aðru ferð, at Grønland sum vertur hevur gjørt av at hava ferðavinnustevnuna í Danmark, haðani londini í útnorði kunnu bjóða fram síni ferðatilboð.

Endamálið við Vestnorden Travel Mart, sum felagsskapurin NATA (North Atlantic Tourism Association) nú stendur aftanfyri, er at samstarva í útnorði um felags ferðavinnuáhugamál.

Tað eru leiðslurnar innan ferðavinnu í Føroyum, Íslandi og Grønlandi, sum hava trý umboð hvørt í NATA og síðan 2007, tá felagsskapurin varð stovnaður, er NATA høvuðsfyriskipari av Vestnorden Travel Mart.

Áður vóru tað ferðaráðini í hesum trimum londunum, sum stóðu aftanfyri hesa ferðavinnustevnu í útnorði.

### Føroysk luttøka

Aftur í ár verða fleiri føroyskir útbjóðarar við á Vestnorden Travel Mart, og størsti útbjóðarin úr Føroyum er sum áður Atlantic Airways.

Maria á Lofti, sølu-og marknaðarfulltrúi hjá føroyska flogfelagnum, sigur, at ferðavinnustevnan hesaferð er skipað øðrvísi enn undanfarin ár.

- Stevnan verður hildin á Scandic-hotellinum í Keypmannahavn, og hesaferð verða útbjóðararnir ikki á básum. Útbjóðarar hava fundarborð, har seljarar og keyparar sita yvir av hvørjum øðrum og tosa um samstarv og møguleikar.

Hon sigur, at tey, sum eru við á stevnuni við sínum útboði, hava sent út innbjóðingar, og fundir eru avtalaðir frammanundan.

- Í ár er tað soleiðis, at keyparar hava framíhjárætt á tann hátt, at tey hava skrivað á ein lista, hvønn tey vilja tosa við, og síðan hava fyriskiparar roynt at fáa ”kabaluna” at ganga upp.

Maria sigur, at Atlantic Airways hevur fleiri avtalur um fundir á stevnuni, og felagið fer við góðum treysti at tosa við áhugaðar keyparar.

Sjálv ferðavinnustevnan letur upp mikudagin klokkan 14 og er opin til klokkan 17. Hósdagin letur stevnan upp klokkan 9 og er opin til klokkan 17.

- Áðrenn sjálv stevnan byrjar, verður mikumorgunin eitt seminar í Planetarinum, sum liggur beint við Scandic-hotellið, og har verða fyrilestrar hildnir um ferðavinnu. Men so skjótt, sjálv stevnan byrjar klokkan 14, hava vit avtalur um fundir, sigur Maria á Lofti.





*Maria á Lofti er roynd á sínum øki, og hon hevur starvast hjá Atlantsflogi síðan 1992. Heilt síðan 1975 hevur hon arbeitt á flogvøllinum og var í nógv ár í starvi hjá Flogfelag Føroya, har hon eitt nú tók sær av avgreiðslu av ferðafólki. Mikudagin og hósdagin luttekur hon fyri Atlantsflog á Vestnorden Travel Martí Keypmannahavn*

### AA er altíð við

Sølu-og marknaðarfulltrúin sigur, at ferðavinnustevnan, sum Atlantic Airways og nú Uttanríkisráðið eru farin at skipa fyri í Føroyum undir heitinum Visit Faroe Island, er sera væl umtókt millum føroyskar útbjóðarar.

- Í nøkur ár skipaðu vit fyri stevnuni Fly Faroe, men síðan er hetta vorðið til eitt felags tiltak, sum Uttanríkisráðið nú beinleiðis er við í sum stuðul.

Hon vísir á, at til hesa stevnu koma keyparar, tí teir longu frammanundan hava áhuga í Føroyum, og føroyskir útbjóðarar hava verið rættiliga fegnir um hesa stevnu, sum ”drippar” av sær víða um í okkara ferðavinnu.

- Til hesa stevnu bjóða vit okkara góðu viðskiftafólkum heim til Føroya,